# FCK skeiklaði um gáttina

**Hóast dyrnar leingi stóðu víðopnar hjá Toda og liðfeløgunum at sleppa upp í part millum teir bestu í Europa, so kiksaði tað í síðstu løtu**




FCK ÚR EUROPA CUP
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Enn hevur eingin føroyingur roynt seg í fremstu liðkappingini í Europa í fótbólti. Undan mikukvøldinum vóru vánirnar og vónirnar góðar fyri, at Todi Jónsson skuldi vera fyrsti føroyingurin, sum rakk so langt. Nú er greitt, at tað verður hann ikki – í hvussu so er ikki í hesum umfarinum!

Fyri FCK og danskan og norðurlendskan fótbólt sum heild var tað stórt vónbrot, at tað ikki eydnaðist mikukvøldið á heimavøllinum í Parkini at taka av stóra møguleikanum, sum stóð FCK í boði, eftir at teir høvdu megnað 1–1 á Ibrox í Glasgow.

Glasgow Rangers vann 2–1, og harvið vóru tað teir og ikki FCK, sum spældu seg í bólkaumfarið. Tað er lítið sannlíkt, at tað fer at bera donskum feløgum til at fáa eitt lættari mótstøðulið og harvið ein betri møguleika at sleppa upp um gáttina til stóru ítróttarligu avbjóðingarnar og stóru peningaupphæddirnar, enn FCK hevði í hesum førinum. Danskur liðfótbóltur er harvið bumbaður ikki so lítið aftur – í hvussu so er sammett við tað støðið, sum teir sjálvir høvdu roknað við, at teir vóru á.

### Mistøkini kostaðu

Todi Jónsson var millum teir fyrstu ellivu í avgerandi avbjóðingini hjá FCK, og hann var á vøllinum í ein góðan tíma. Fyrstu trý korterini gekk alt fyri seg eftir treytunum, sum FCK setti. Teir høvdu ikki skund, og teir vóru eitt lítið sindur varnir, uttan at teir tó lógu heilt aftarlaga á vøllinum. Todi og Zuma fingu ikki so ógvuliga góða hjálp frá aftaru monnunum. Tað var sjáldan, at FCK rættuliga spældi seg ígjøgnum í borðunum og legði innfyri. Heldur var talan um langar stikkbóltar til fremstu menninar, sum onkra ferðina í samanspæli og onkra ferðina í sjálvdrátti næstan komu í góðar støður. Teir høvdu onkrar royndir ímóti málinum, men tær vóru ikki vandamiklar.

Tá ið Glasgow setti hol á, og tá ið teir øktu til 2–1 var talan um mistøk í FCK verjuni, sum eirindarleyst vórðu sektaði. Í fyrra førinum var talan um óneyðugt fríspark, sum málverjin bara hálvbjargaði og so varð brotsspark. Í seinna førinum var talan um langt innkast, sum tríggjar minuttir undan leikloki, tá ið støðan var 1–1, ikki átti at havt borið mál við sær. Men tað gjørdi tað, og harvið var FCK úti í myrkrinum.

Álvaro og Jörgen Pettersson loystu Toda Jónsson og Erik Mykland av, tá ið Glasgow var á odda 1–0. Løtu seinni kom Peter Møller á vøllin fyri vongverjan Ole Tobiasen. FCK hevði nógv fólk í mótstøðubrotsteiginum, og tað eydnaðist brasiliumanninum, Álvaro, í fyrsta dystinum fyri FCK at javna til 1–1 og harvið kveikja spenningin av nýggjum. Men bara í eina lítla løtu.

### Framtíðin

Nú FCK er fokið í meistarakappingini, skulu teir saman við m. a. Brøndby luttaka í UEFA kappingini. Hans Backe, FCK venjarin, var ógvuliga vónsvikin mikukvøldið, men hann segði seg vóna, at sviðin ikki fór at kennast so meinur, at FCK ikki fór at standa seg væl í landskappingini og UEFA kappingini. Tað fæst at síggja næstu vikurnar, hvussu tað verður við tí.

Undan mikukvøldinum varð nevnt, at einir tríggir FCK spælarar vónaðu í avgerandi dystinum ímóti Glasgow Rangers at spæla seg til stórar sáttmálar uttanlands. Nevndir vórðu Zuma, Thomas Røll og Martin Albrechtsen. At avrikini hjá teimum mikukvøldið skuldu bera nýggj feløg og størri lønarposar við sær, man vera ivasamt. Men tað kann framvegis hugsast, at FCK er áhugað í at selja spælarar og vinna pengar og keypa nýggjar sáttmálar, nú tað gekk, sum tað gjørdi. Trupulleikin er bara, at hetta umfarið at keypa og selja í verður liðugt sunnukvøldið á midnátt.

### Skotland upp ogNorðurlond niður

Fyri skotskan liðfótbólt hevur henda vikan verið framúr væl eydnað. Celtic spældi seg týskvøldið víðari í meistarakappingini, og mikukvøldið eydnaðist tað altso hjá kappingarneytunum hjá teimum í Glasgow, Rangers.

Hjá Norðurlondum skarst vikan heilt illa. Frammanundan var greitt, at Finnland, Ísland og Svøríki einki umboð skuldu hava í bólkaspælinum. Møguleikarnir vóru Rosenborg og FCK. Týskvøldið tapti Rosenborg 1–0 á útivølli ímóti La Coruna, sum teir heima í Tróndheimi høvdu spælt málleysan javnleik ímóti. Harvið var greitt, at Rosenborg, eftir at hava verið við í bólkaspælinum átta ferðir á rað, ikki verður við hesa ferð. Mikukvøldið kiksaði tað hjá FCK, sum tapti 2–1, eftir at hava megnað 1–1 á útivølli.

Bólkaumfarið fer nú neyvan at kennast so nært og viðkomandi, sum tað hevði havt kenst fyri norðurlendingar, norðmenn, danir og eisini føroyingar, um Rosenborg og serliga FCK høvdu megnað meiri, enn tey gjørdu hesa ferð.

Hans Backe, FCK-venjari:

# Mistøkini kostaðu

**- Vit halda teimum burtur frá veruligum málmøguleikum næstan allan dystin, men tey persónligu mistøkini hjá okkum kostaðu, segði Hans Backe á tíðindafundi eftir dystin**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

**Sosialurin, Keypmannahavn:**
Venjarin hjá FCK mátti ásanna, at liðið við teimum drúgvaru royndunum royndist betur í Parkini mikukvøldið. Tvey mistøk í verjuni kostaðu ógvuliga dýrt, tí hóast Champions League bólkaspælið var í eygsjón, verður tað av ongum á hesum sinni.

Hans Backe helt annars, at dysturin gekk nógv aftur og fram, har liðini skiftust um at hava leggja trýst á mótstøðuliðið.

- Mann má bara ikki lata tvey mál inn á heimavølli. Teir skora eftir tvær deyðbóltsstøður, og tað er eitt sera stórt vónbrot fyri meg sum venjara, segði Hans Backe við fjølmiðlar eftir dystin.

### Royndirnar komu til góðar

Hann vísti á, at Rangers hevur fleiri royndar leikarar, ið hava spælt nógvar altjóða dystir, og møguliga var tað orsøkin til, at Rangers megnaði at vinna, hóast FCK spældi fult upp við skotska liðið.

Backe segði annars um innskiftingina av Santos, at hetta var rein gambling, tí at hann ikki hevði spælt ein veruligan dyst í næsta fýra mánaðir, og at hann bert hevði vant við fullari ferð saman við hinum liðfeløgunum í tíggju dagar.

- Nú mugu vit bara satsa uppá landskappingina og UEFA Cup, segði ein heldur lotur venjari eftir tað sera stóra vónbrotið. Hann hevði eins og næstan øll onnur í Keypmannahavn sett nøsina upp eftir Champions League.



# Katrin og Sigrid í HM-finaluni

**Mikudagin fóru Katrin Olsen og Sigrid Svartá undir stóru avbjóðingina, tá tær saman við hinum á danska fýraranum uttan stýrmann skuldi royna at vinna seg fram til HM-finaluna.**



*Katrin Olsen, sum her sæst rógva í Danmark, hevur góðar vónir til sunnudagin*

Kappingin er í Milano í Italia, og her eydnaðist bátinum hjá Sigrid og Katrin at gerast nummar tvey mikudagin, soleiðis at tær nú eru í finaluni.

Mikudagin var einasti báturin, sum kom fram um donsk/føroysku manningina USA, sum vann við trimum og einum hálvum sekundi. Fjarstøðan niður til triðja plássið var annars eini 8-9 sekund, men hóast hetta, so vóru tær báðar føroysku tó ikki heilt nøgdar.

- Vit skuldu havt vunnið á USA. Vit førdu fyrstu túsund metrarnar, men so sluppu tær nakað lættliga framum, og tað má so ikki henda.

- Í finaluni verður so einki spart. Vit ætla okkum at leggja hart út, og so ræður bara um at halda fast. Har er so í øllum førum ikki nakar, sum bíðar eftir okkum, so tað er bara um at geva alt, sigur Katrin Olsen, ið sum vera man eru sera spent.

### Sigrid bíðar

Sigrid Svartá var ikki við í bátinum mikukvøldið. Hon hevur verið nakað eym í rygginum, og fyri at spara hana til sjálvan finaluróðurin, verður tað sera avmarkað, hvussu nógv hon fer at gera um seg fram til tá.

Í finaluni verða tað Holland, Kina, Australia, Týskland og USA, sum danski báturin skal kappast ímóti. Av hesum hevði danski báturin ringastu tíðina mikudagin, og tí verða tær antin á innasta ella ytsta bananum, tá finalan verður. Sambært Katrin, so kann hetta geva trupulleikar, um so er, at tær skulu rógva á bana eitt, tí onkrar smærri áir eru, sum renna út í vatnið, har róð verður. Hesin trupulleikin verður tó partvíst uppvigaður av, at hetta samstundis er banin, sum er næstur áskoðarunum, og tað kann geva eyka megi seinasta teinin, um geylini hoyrast sum best.

Hvussu er og ikki, so verður tað størsta avbjóðingin higartil hjá teimum báðum, tá tær sunnudagin skulu kappast um sjálvt heimsmeistaraskapið. Finalan verður klokkan 10.15, og fer Eurosport at senda beinleiðis frá hesum.

# Vejle vónbrot í Odense

**Christian Høgni Jacobsen var vongverji í høgru mikukvøldið, tá ið Vejle noyddist aftur um brúnna um Lítlabeltið við 2–1 tapi**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað hevur gingið nógv upp og niður hjá Vejle hesar fyrstu vikurnar í nýggja kappingarárinum. Mikukvøldið var fimta umfarið á skránni. Vejle var á útivølli í Odense ímóti B1913, og tað var stórt vónbrot fyri Vejle, at teir taptu 2–1 ímóti einum av feløgunum, sum fyrr í summar við neyð og deyð kom undan niðurflytingini, og sum aftur í hesum kappingarárinum verður roknað sum eitt av fremstu evnunum til niðurflyting.

Christian Høgni Jacobsen fjakkar rættuliga nógv á Vejle liðnum. Á heimavølli sunnudagin var hann á sentrala miðvøllinum og málskjútti. Frammanundan hevur hann verið álopsspælari, vongverji og skiftisspælari. Mikukvøldið var hann aftur á vongverjanum í høgru.

B1913 legði seg framum í 9. minutti. Miðvallarin í høgru og liðformaðurin hjá Vejle, Peter Degn, javnaði við brotssparki til 1–1 í 23. minutti, og tríggjar minuttir seinni skoraði heimaliðið sigursmálið, sum bar annað Vejle tapið í hesum kappingarárinum við sær. Vejle er nú á níggjunda plássinum við sjey stigum.

Felagið hjá Johan Byrial Hansen, AC Horsens, sum er grannafelag hjá Vejle, er á odda. Mikukvøldið vunnu teir 2–0 á útivølli ímóti Ølstykke, sum teir frammanundan vóru javnir við í stigum. HFK Sønderjylland, Køge og Ølstykke hava øll tólv stig. Mikukvøldið vann HFK 7–1 á heimavøllinum í Haderslev ímóti FC Aarhus, og Køge vann 1–0 á heimavølli ímóti B93. Fremad Amager er eftir 3–0 útisigur a FC Nordjylland á fimta plássinum við tíggju stigum.

Hini úrslitini mikukvøldið: Silkeborg–Nykøbing Falster Alliancen 2–0 og Fredericia–Brønshøj 2–1.

# Føroyar trý pláss eftir hæli

**Síðani á nýggjárinum hevur tað gingið støðugt skeiva vegin á altjóða FIFA listanum, har Brasilia og Frakland framvegis eru ovast, og har Danmark framvegis er besta Norðurlandið**

FIFA STYRKISLISTIN
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Á altjóða styrkislistanum hjá FIFA eru 204 fótbóltstjóðir. Sambært listanum, sum í vikuni er kunngjørdur at galda fyri august, eru Føroyar styrkismettar sum nummar 118 í heiminum. Hetta er trý pláss lægri á listanum, enn Føroyar vóru fyri einum mánað síðani, og hetta er fimm pláss lægri, enn Føroyar vóru á nýggjárinum.

Føroyar hava onkra ferðina verið eini tíggju pláss hægri, enn tær eru nú. Um tað eydnast at fáa góð úrslit á útivølli ímóti Skotlandi annan leygardag og á heimavølli ímóti Litava annan mikudag, so fer tað ivaleyst at hjálpa upp á støðuna. Góð úrslit í hesum sambandinum verða roknað sum javnleikur í Glasgow og sigur á Svangaskarði.

Á nýggja styrkislistanum er Skotland mett at vera nummar 59, og Litava verður roknað at eiga tað landsliðið, sum er mett at vera tað 93. besta í heiminum.

Brasil er framvegis ovast, og Frakland er næstovast. Spania er nummar trý, Holland og Mexico eru bæði nummar fýra, Argentina er nummar seks, so koma Turkaland, Ongland og USA, sum hesa ferð er eitt pláss ovari á listanum enn Týskland. Tað man ikki ofta vera komið fyri áður.

Italia er nummar ellivu, Kekkia nummar tólv, Írland er á trettanda plássinum og Cemeroun eru nummar fjúrtan og eitt pláss hægri enn Danmark, sum er hægst styrkismett av Norðurlondunum. Svøríki er nummar tjúgu, Noreg nummar 22, Finnland er á 43. plássinum og Ísland er nummar 56 ella trý pláss frammanfyri Skotland.